


**Nr. 19** *11. september 2022* **82. árg.**

# Jesu Gudsmynd

Summi hava eina góða, inniliga og hjartaliga gudsmynd, meðan onnur hava eina stranga og álvarsliga gudsmynd. Fara vit aftur til trúbótina, um 1500 talið var høvuðsspurningurin: „Hvussu finni eg ein náðigan Gud?“

Í dag eru vit farin yvir í mótsettu síðu, og vit tilevna Gud eftir egnu mynd okkara.

Hvør er Gud? Móses biður lova sær at síggja andlit Guds (2. Mós. 33,18): „Lat meg tó síggja dýrd tína.“ Eingin kann síggja andlit Guds og liva. Hin tríggjar ferðir heilaga Gud kunnu vit ikki síggja andlit til andlits. Men Gud sigur, at Móses skal sleppa at síggja hann aftaníffrá. Hvat sigur henda frásøgn okkum? Jú, at vit skulu hava ærufrykt fyri Gudi. Gud er heilagur – og vit eru syndarar, sum hava fingið náði.

Vit síggja eina mynd av einum umsorgarfullum Gudi í Sálmi 103,13–14: „Sum ein faðir er mildur móti børnum sínum, so er Harrin mildur mót teim, sum hann óttast, tí forløg vár hann kennir, honum kemur í hug, at dust vit eru.“

Gud kann ikki broytast. Hann er heilagur, men hann er eisini miskunnsamur! Jesus líkist nágreiniliga Gudi. Í Jóh. 1,18 stendur: „Eingin hevur nakrantíð sæð Gud, men hansara egni Sonur, sum er tætt knýttur at Pápa sínum, hevur víst okkum, hvør Gud er.“ (N.S.) Jesus sigur í Jóh. 14,9 við Filippus: „Tann, sum hevur sæð meg, hevur sæð faðirin.“

Jesus hevði eitt inniligt og tætt samband við Gud. Hann kallaði Gud pápa sín. Tá ið Jesus bleiv doyptur, kallar Gud hann son sín: „Hetta er sonur mín, hin elskaði, sum eg havi góðan tokka til.“ Á fjallinum sleppa lærusveinarnir at hoyra:

„Hesin er sonur mín, hin elskaði, sum eg havi góðan tokka til. Lýðið á hann!“

Við grøv Lázarusar sigur Jesus: „Faðir, eg takki tær fyri tað, at tú hevur hoyrt meg. Eg visti fullvæl, at tú altíð hoyrir meg.“ Vit skilja, at Jesus kundi siga Faðir við Gud. Men vit syndarar kunnu helst ikki kalla tann heilaga Gud Faðir okkara? Harrans bøn, sum Jesus lærdi okkum at biðja, er kollveltandi. Har sigur Jesus, at bønir okkara fara til Faðir í Himli. Aftan fyri orðið Faðir er eitt persónligt og tætt samband. Eitt serligt skriftstað stendur í Ef. 3,15: „Frá Honum (Gudi) hevur alt, sum faðir eitur, í Himli og á jørð, navn sítt.“ Ert tú eitt mannabarn, vil Gud vera faðir tín!

Jesus hevur víst okkum, hvør ið Gud er. Jesus er fullur av náði og sannleika. Hann er kærleiki. Hann er rættvísur. Hann leitar eftir tí, sum er vilst.

Gud er heilagur. Hann er kærleiksfullur. Gud elskar okkum øll. „Síggið, hvussu miklan kærleika faðirin hevur sýnt okkum, at vit skulu verða kallað Guds børn, og tað eru vit.“ 1. Jóh. 3,1

Ein undurfullur boðskapur at bera víðari.

*Effie Campbell* umsetti.

# Keyptur fríur

**Ein enskur ferðamaður greiðir soleiðis frá:**

Mitt inni í Afrika hendi tað einaferð, at ein gonga av trælum kom fram við høvdinganum. Høvdingurin kallaði ein træl fram, sum hevði gjørt hann firtnan. Beinanvegin gav hann monnum sínum boð um at spenna bogarnar og skjóta trælin at hevna hetta við blóðinum hjá hesum seka.

Onglendingurin fór yvir til høvdingans og bað um lívið hjá trælinum, við tað at hann bjóðaði honum pengar og dýrgripir. Men høvdingurin svaraði: „Mær nýtist ikki pengar ella gávur frá tí hvíta manninum. Eg vil bara hava blóð.“

Síðani gav hann einum av monnum sínum boð um at skjóta eina ørv gjøgnum hjartað á trælinum. Í sama sekundi blakaði onglendingurin seg ímillum og hevði arm sín á lofti. Í næstu løtu sat ørvin føst í armi hansara. Hann dró ørvina út úr tí bløðandi sárinum og segði: „Her er blóð, her er mítt blóð. Eg gevi tað fyri henda trælin og krevji lív hansara.“

Høvdingurin, sum ongantíð hevði sæð nakað sovorðið, gav hvíta manninum trælin, meðan hann segði: „Hvíti maður! Tú hevur keypt hann við blóði tínum, tú eigur hann.“

Trælurin blakaði seg niður fyri føturnar á frelsara sínum, tárini streymaðu niður eftir kjálkum hansara, og hann segði: „O, hvíti maður, tú hevur keypt Lebe við blóði tínum. Lebe vil vera trælur tín um ævir.“

Eingin fekk hann at taka við frælsi sínum. Allastaðni, har sum onglendingurin fór, var Lebe undir liðini á honum. Einki arbeiði var ov torført fyri hann, eingin byrði ov tung. Við tí miskunnsemi, sum bjargingarmaður hansara sýndi honum, var hann bundin til hansara sum trúgvi tænari hansara.

O, vinir, um hjartað í einum villum træli kundi bindast soleiðis til sárið á arminum á einum bjargingarmanni, hvat skulu vit tá siga um okkara bjargingarmann, Jesus, sum varð særdur fyri okkara misgerðir og doyði, fyri at vit skuldu liva?

Um vit av sonnum trúgva, at vit eru endurloyst við Jesu dýra blóði, hvussu kunnu vit annað enn yvirgeva okkum til hansara, fyri heilt at hoyra honum til í tíðir og ævir?

*Effie Campbell* umsetti.

# Himmalskir tónar

*„Lovið honum, allir einglar hans, lovið honum, allir herar hans!“ Sálm. 148,2.*

Abbi var yvir 70 ára gamal. Saman við konu sínari og dóttrini sat hann ein fyrrapart við borðið í heimi sínum. Tey vóru júst liðug at eta, men vóru sitandi eina løtu og prátaðu. Tá alt í einum hugdi abbi upp og vendir sær til hini og spyr: „Hvat er hetta fyri vakur tónleikur?“

Men hini hoyrdu einki. Tøgn var eina løtu, so spurdi abbi aftur enn meira bilsin: „Men hoyra tit ikki henda vakra tónleikin?“

Hini hyggja bara bilsin upp á hann, tí tey hoyra einki. Abbi hugdi tá milt brigslandi upp á tey, minst líka bilsin sum tey.

Bara eina løtu seinni, tá ið abbi skuldi fara frá borðinum, seig hann saman. Har og tá doyði hann.

*Effie Campbell* umsetti.

# Gev Gudi tað besta!

Konan, sum stoytir ta dýru nardussalvuna niður yvir Jesus, gevur Meistaranum tað besta, hon hevur. Rokna vit hetta um til føroyskan kurs, sum hann er í dag, verður tað 300.000 kr.

Hon gevur Jesusi tað besta. Hon gevur eina ársløn. Ja, hon brýtur krukkuna, so at hon ikki skal angra tað, hon gevur

Jesusi. Gera vit tað sama? Geva vit Meistaranum tað besta, vit hava? Angra vit, tá ið vit geva Meistaranum?

Gev Gudi tað besta! Ja, latið okkum gera tað! Latið okkum geva so nógv, at tað verður ein trúarroynd. Júst tá fær Harrin høvi at vísa tær, hví hann sigur: „Roynið meg við hesum, sigur Harri herliðanna, um eg ikki tá lati tykkum himinsins lokur upp og ríkliga helli út signing yvir tykkum.“ Mál. 3,10.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ogn Guds barna

* Grøvin er tóm –
* Jesus livir í mær/okkum –
* Friður okkara kemur ikki frá hesi verð –
* Gleði okkara kemur innanífrá –
* Henda verð er ikki heim okkara –
* Jesus er okkara góði hirði
* Gud er okkara kærleiksfulli faðir –
* Heilagi Andin í okkum er sterkari enn tíðarandin og angist andin í verðini.

Eitt dagligt ja til Jesus merkir, at eg í øllum viðurskiftum orki alt í Honum, sum gevur mær kraft. Tað merkir, at eg havi lært at vera nøgd við tað, eg havi – bæði at hava almikið og at hava trot. Fil. 4,11–13.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Hví heldur tú, at Ísrael støðugt er á framsíðunum í fjølmiðlunum? Av tí at Gud arbeiðir profetiskt í landinum – og Satan hatar tað. Tí hann veit, at pallurin fyri afturkomu Jesusar verður gjørdur til reiðar.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 11. sept. | **Tekstur:** | 1. Mós. 3,1-13 + 23-24 | **Bíbliuorð:** | Róm. 7,19 |
| 18. sept. | **Tekstur:** | 1. Mós. 1,1-2,4 | **Bíbliuorð:** | Sl. 33,6 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 20** ***25. september 2022*** **82. árg.**

# Eru fólk á øðrum gongustjørnum?

Gud hevur skapt billiónir av stjørnubreytum. Eru vit einsamøll í universinum? Bíblian sigur: Ja, sum menniskju eru vit púra einsamøll!

Bíblian er Guds opinbering um tað, sum er satt á øllum lívsins økjum. Vit hava ikki brúk fyri nakrari vísindaligari játtan um tað. Her eru fleiri bíbilskar grundgevingar, sum vísa á, at vit eru tey einastu menniskjuni í universinum. Gud sigur: „Himmalin er himmal fyri Harranum, men **jørðina hann menniskjum gav**.“ Sálm. 115,16.

Gud skapti menniskjuni sætta dagin – á jørðini – og leit teimum upp í hendur at vera harrar yvir øllum skapninginum: „Gud vælsignaði tey, og Gud segði við tey: „Verðið barnrík og fjølgist og uppfyllið jørðina og leggið hana inn undir tykkum, og ráðið yvir havsins fiskum og yvir himmalsins fuglum og yvir fenaðinum og yvir øllum villdjórunum, sum rørast á jørðini!“ 1. Mós. 1,28.

Gud skapaði jørðina, sum einasta bústaðin hjá menniskjum. Skrivað stendur: „… Hann, sum ikki skapaði hana til at liggja í oyði, nei, til bústað hjá fólki: Eg eri Harrin, og eingin annar.“ Esaias 45,18 V.D. Universið og stjørnuhimmalin hava eitt annað endamál enn jørðin. Tey skuldu vísa Guds stórleika og makt: „Harri, Harri okkara, hvussu dýrt er ikki navn Títt um alla jørðina, Tú, sum hevur breitt út dýrd Tína yvir himmalin!“ Sálm. 8,1 V.D. – „Himlarnir kunngera dýrd Guds, hvølvið ber boð um handaverk Hansara.“ Sálm. 19,1 V.D.

Jesus kom **til jarðar** at doyggja fyri menniskju her – ikki fyri skapningar á øðrum klótum. „Tí at Kristus leið eina ferð fyri syndarar …" 1. Pæt. 3,18. Jørðin er skapað, so at menniskju skulu búgva her. Universið er ikki gjørt til okkara. Um fólk høvdu verið á øðrum klótum, hevði Gud biðið okkum – um tað hevði verið gjørligt – at borið evangeliið til teirra eisini. Hann hevur bara givið okkum verðina sum okkara missiónsakur (Matt. 28,18–20) Vit skulu gera „øll fólkasløg" til Jesu lærusveinar.

Men at tað eru aðrar andaverur í universinum, er ein onnur søk. Demonir og falnir einglar í ymiskum skapilsum og við UFO-fyribrigdum, slíkir eru til í milliónatali. Paulus skrivar um djevulsins kreftir soleiðis: „…móti valdunum, móti ráðunum, móti heimshøvdingunum í hesum myrkri, móti andaherliðum illskaparins í himnarúmdum" (Ef. 6,12). Her er djevulin „høvdingurin yvir hervaldinum í luftini" (Ef. 2,2 V.D.). Hesir fara at opinbera seg oftari og oftari, so hvørt sum vit nærkast afturkomu Jesusar. Hví eru UFO-fyribrigdini økt í tali tey síðstu árini? Økingin byrjaði í 1947, árið fyri at Ísrael fekk land sítt aftur. Ísrael er vekingarklokkan í endatíðini.

*Effie Campbell* umsetti.

# Kann okkurt tómt vera gott?

Ein tóm bankakonta, eitt tómt kuldaskáp ella eitt tómt lív er einki at fegnast um. Eitt lív kann vera so tómt, at tað tykist einki vert.

MEN ein TÓM GRØV Í JERUSALEM er tann mest gleðiligi, lívgevandi og lívsbroytandi tómleiki, tú kanst møta.

Tað hellið, Jesus varð jarðaður í – var tómt, tá ið nakrar konur komu at salva líkið av Jesusi, tí tað høvdu tær ikki fingið stundir til eftir krossfestingina. Grøvin var ikki bara tóm – men Jesus kemur ongantíð at liggja í einari grøv aftur.

Næstu ferð, Hann kemur til Jerusalems, kemur Hann sum kongur Konga og Harri Harra. Men nú vil hin upprisni Jesus geva tær eitt innihaldsríkt lív restina av lívi tínum her á jørð – og síðani eitt ÆVIGT LÍV við Honum á einari nýggjari jørð, í einum nýggjum himli og í einum nýggjum Jerusalem.

Trúgv á Hann, sum deyðin ikki kundi halda í grøvini! Trúgv á Hann, sum vil vera tín góði Hirði! Trúgv á Hann, sum

hevur fyrireikað ein bústað í Himli til tín! Trúgv á Hann, sum ikki svíkur teg! Trúgv á Hann, sum kemur aftur!

*Effie Campbell* umsetti.

# Familjan

*Ein sterk kristin familja er ein griðstaður, eitt friðskjól.*

Arbeiðið er krevjandi. Skúlagarðurin er næstan ikki fyri børn longur. Ferðin á okkara dagliga lívi er fullkomiliga ótamd og vill! Hvar kanst tú hvíla teg og taka tær av løttum? Um tú ikki kanst gera tað heima – hvar so? Theodore Roosevelt forseti segði: „Eg vil til eina og hvørja tíð heldur vera eitt kvøld saman við familju míni enn saman við teimum navnframastu politikarunum í verðini.“ Heim hansara var eitt friðskjól fyri lívsins stormum – er títt heim tað?

Tá ið Móðir Theresa fekk Nobel Friðarheiðurslønina, varð hon spurd: „Hvat kunnu vit gera fyri at fremja friðin í verðini?“

Hon svaraði: „Far heim og elska familju tína!“

Um tú vilt gera ein mun her í verðini – elska og virðismet so familju tína.

*„... et Ord til Dagen“ – Effie Campbell umsetti.*

# Ríkastur í verðini

*Skriftin sigur: „Vit vita, at vit eru komnir frá deyðanum yvir til lívið, tí at vit elska brøðurnar.“ 1. Jóh. 3,14. Man hatta nú bera til?*

Tá ið John D. Rockefeller var 53 ára gamal, var hann heimsins ríkasti maður. Hann hevði arbeitt hart at savna sær so nógvan pening, og hann hevði ikki altíð víst fyrilit móti sínum medmenniskjum, tá ið hann turnaði avstað fyri at fáa framgongd. Tað vóru mong, sum vóru óð og beisk inn á hann. Men hansara virki og íløgur gingu væl, og hann fekk allan tann pening, ein kundi ynskja sær.

Tú skuldi hildið, at ein maður, sum var so ríkur, at hann kundi keypa, hvat ið hann vildi, fara at ferðast, har hann hevði hug, gera júst tað, sum fall honum inn, skuldi verið eitt ógvuliga eydnusamt menniskja.

Men tá ið Rockefeller var 53 ára gamal, var hann sjúkur og ússaligur og bangin. Tað einasta, hann fekk niðurum, var

keks og mjólk. Einki annað fór niður í hann. Hann hevði mist alt hárið, ja, eisini eygnabrýrnar. Tað tóktist, sum hevði hann ikki langa tíð eftir at liva í. Tá ið hann lá og hugsaði um hetta tær longu svøvnleysu næturnar, kom hann so við og við fram til eina hugsan, sum gav honum ein ordans skelk: Tá ið hann doyði, fekk hann ikki tikið so mikið sum ein einasta cent við sær, ikki eitt reytt oyra.

Hvat skuldi tú so hava allar pengarnar til? Hetta var ein spurningur, sum hann hugsaði nógv um og royndi at finna eitt rættiligt svar til. Og hann fann tað. Hevur tú pengar, mást tú geva burturav til teirra, sum tørva hjálp. Hatta er eingin nýggj hugsan, heldur tú kanska; men hon var nýggj fyri Rockefeller. Hann fór nú at geva meir og meir av síni tíð og sínum pengum til at kanna heilivág og til onnur virðismikil hjálpartiltøk. Meðan hann livdi, gav hann 600 mill. dollarar.

Men hvat hendi við Rockefeller sjálvum, hesum sjúka, friðleysa manninum? Hann broyttist púra. Fyrst og fremst fór hann at síggja nógv betri út nú, tá ið hann fór at hugsa um at hjálpa øðrum og ikki bara hugsaði um seg sjálvan. Hann fekk matarlystin aftur, hann fekk nýggja lívsgleði og kendi seg ungan aftur. Tey, sum hildu, at hann hevði bara eitt ár eftir at liva í, undraðust, tá ið hann gjørdist sterkari og frískari fyri hvønn dag, sum fór. Hann livdi, til hann bleiv 98 ára gamal.

Hansara máti at liva uppá broyttist eisini. Hann var ikki longur ein næstan hataður maður, sum livdi í einingi. Hann fór at hava áhuga fyri øðrum og upplivdi, at hann kundi fáa vinir, ikki bara „keypa“ teir. Hansara umhugsan fyri øðrum varð høgt mett, og hann upplivdi gleði, tá ið hann sá, at hansara stríð bæði gleddi onnur og bjargaði lívi. Men hansara strev hevur nokk eisini bjargað honum sjálvum frá at doyggja á ungum árum.

Vit mugu takka Gudi fyri alt, hann hevur givið okkum her í lívinum, og vit mugu biðja hann hjálpa okkum at vísa okkara takksemi við at geva øðrum burtur av tí, sum vit hava.

*Effie Campbell* umsetti.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 25. sept. | **Tekstur:** | Luk. 1,26-38; Matt. 3,17 | **Bíbliuorð:** | Luk. 2,11 |
| 2. okt. | **Tekstur:** | Mark. 15,1-15 + 33-39; 16,6-7 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 3,16 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74